

Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 25. mars 2007 og gjørdu mær dagin so minnisríkan.
**Heilsan Elsa Mørkøre, Tórshavn**



**Góði elskaði Jónas**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðinardegnum. Mamma, babba, systi og beiggi gleða okkum til at fara í Euro Disney saman við tær fríggjadagin. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan mamma, babba, systi og beiggi**

**Góði Jóhan**
Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við 6 ára føðingardegnum, sum var 16. juni. Takk fyri ein góðan dag.
**Heilsan omma og abbi á Argjum**



# Brúðarmyndir



*9. juni 2007 vóru vit gift í Vor Frue Kirke í Assens, Fyn.*
***Annika og Mogens Lajgaard Danielsen***



*Øllum tykkum sum við gávum, blómum, fjarritum og á annan hátt gleddu okkum á silvurbrúðleypsdegi okkara 3. feb, takka vit hjartaliga.*
***Arngerð og Mortan***

# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**3. s. e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** Kl. 11 Sverri Steinhólm
***Nólsoy:*** Kl. 12 Sonja Klein Leirvík: kl. 11, Uni Næs, altargongd
***Glyvrar:*** kl. 11, Havstein Klein og Meinhard Bjartalíð, altargangur.
***Elduvík:*** kl. 13.15, Uni Næs, altargongd
***Vestmanna:*** kl. 11, Marjun Bæk
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11 Jógvan Fríðriksson
***Christianskirkjan:*** altargangur, kl. 11, Niels Pauli Danielsen.
***Kunoy:*** altargangur, kl. 12, Magnus Brahé Jørgensen.
***Sjúkrahúsið:*** andakt kl. 10, Magnus Brahé Jørgensen.
***Røktarheimið:*** andakt kl. 14.30, Magnus Brahé Jørgensen.
***Skálavík:*** kl. 12, altargongd, Fríðleif Lydersen, stud. theol., og Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11 Jónsvein Bech
***Vágur:*** kl. 11, Patrick de Neergaard

**Katólska Kirkjan**
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Jerzy Kruk, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18.
Øll eru vælkomin.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18: Okkara kvøld.

**Lívdin**
***í Hoyvíkar skúla***
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti, evnið verður "At brúkar gávur sínar", luttøka verður eisini av børnum og ungum við tónleiki.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 Á tilbiðjunarmøtinum talar Jógvan um "Sannleikar úr Rómbrævinum".
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking.
Kl. 11 gudstænasta, Allan Falk.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Leygardagin kl. 21.00 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Familjumøti
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl 18 møti, Stella Zachariasen sigur frá Ísraelsferð.
http://www.gospel.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Steen Palmqvist, evni: Felagsskapurin í meinigheitini. Sangbólkur syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Fríggjadagin kl 7.00 bøn.
Sunnudagin kl 14.00 sunnudagsskúli kl 18.00 møti v/ Sofus Joensen.
Mánakvøldið kl 20.00 bønamøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin møti kl. 11.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Fríggjakvøldið 22. juni kl. 20.00 Ungdómsmøti við Bjarta F. Johannesen, trúb.
Evni: slatur/ tungan
Sunnudagin 24. juni kl. 19.00 Møti við Klæmint Tausen, Tórshavn.
Sí annars www.koma.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 24. juni
Kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30 Samvera við drekka
Kl. 12.00 Seinasti sunnudagsskúli, áðrenn summarfrítíðina og møti. Virgar Hvidbro, talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans.
Kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Royndarhúsið í Nólsoy**
Evangelisk møtir verða í Royndarhúsinum í Nólsoy fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18.
Tórmund og fleiri luttaka við vitnisburði og talu, Herman og Gigga syngja.

**Meinigheitshúsið í Sandavági**
Sunnudagin kl.14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, kl. 21 Útimøti við vitnisburði, sangi og dansi.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygardagin kl. 20.00 ungdómsmøti. Oddmar og Line Steinhólm greiða frá missiónsarbeiði í Ísrael.
Sunnudagin kl. 18.00 møti.
Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Hósvík**
Heimamissiónin hevur útimøti í Hósvík leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Helga Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 11, morgunmøti við Eyðun Jacobsen og familju. Barnamøti kl. 11
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Strendur**
Sunnudagin kl. 15 verður minningarhald við minnisvarðan, nú 50 ár eru farin síðani Goðanes fórst á Flesjunum.
Pétur Hafstein Sigurðsson, skipari, fórst við skipinum.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 22. juni kl. 21 Ungdómsmøti (um viðrar verður farið niðan á Slættaratind).
Sunnudagur kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Símin Joensen, Saltangará, Magda og Maibritt syngja.
Mikudagur 27. juni kl. 20 bíbiltími.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Tabor, Toftir**
Um viðrar verður farið útferð í samband við ungdómsmøti leygarkvøldið.
Hoyra nærri við SMS-boðum.
Hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 13.30 og kl. 18 er møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl 13.30 verður sunnudagsskúli, kl 18 verður møti við Arna Vatnhamar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18.00 møti við Anniku og Alfred við Skipá og Sigrid Sivertsen.
Mánakvøld kl. 20.00 bønarmøti.

**Tiltøk í KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið, 22. juni kl. 22.00 Opið hús
Sunnudagin, 24. juni
Sunnudagsskúlin fer útferð.
Farið verður til Mikladals við Sam kl 10.15 og koma aftur 14.40 av Syðradali. Havi matpakka við.
kl. 18.00 Møti v/ Regin Høgnesen, Trúboðara,
kl. 21.00 Ungdómsmøti v/ Dan Eliasen.

**Getsemane, á Brekku 19**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti v/ Álvur og Nicolinu Jøkladal.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 er møti, sunnudagsskúli er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 bøn- & lovsangur, kl. 18 møti v/Juttu og Salli. Innsavnan.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími 1. Pæt. 2. kap. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti í Betania, Sámal Hanni talar, kl. 18 møti við Gunnhild og Niclas.
Týsdagin kl. 19 ungdómssamling.
Mikudagin kl. 20 bønarmøti.
Hjartaliga vælkomin í Betania.

**Elim Sandur**
Osvald Kjærbo talar á møtinum leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnudagin kl. 17.

**Lopra, útimøti**
verður mánakvøldið kl. 20 Osvald Kjærbo, Svein Petersen o.a tala og syngja.
Hjartaliga vælkomin.

**Salem, Tvøroyri**
Á møtinum týskvøldið kl. 20 talar Osvald Kjærbo, Finnbjørn og Svein syngja.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
á møtinum mikukvøldið kl. 20 tala Osvald Kjærbo og Svein Petersen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, náttartúrur**
Leygarkvøldið 23. juni verður farið til Skarðs. Túrurin er langur og tungur. Farið verður við bussi av Kunningarstovuni kl. 20. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir, ein heitan munn og góðan matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 302425/227039.

**Vága Gongufelag**
Útferð verður í Tindhólm á jóansøku, sunnudagin 24. juni kl. 13.00. Vit fara innaftur kl. 17.00. Kostnaður kr. 330,00. Tilmelding á 333455 ella 213455.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 25. juni***
kl. 10-14 Opið hús
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, dart og onnur spøl
***Tilm. til ólavsøkusøluna í kjallaranum og listaframsýningina á miðhæddini, tlf. 316491***
***Týsdagur 26. juni***
kl. 10-11.30: Sangur. Óli Dahl. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: ***Arbeiðið sum leiðari á eldraøkinum***, Gunnleyg Durhuus. Kjak um eldraøkið. Øll hugskot eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 27. juni***
kl. 10-12.00: Fyrireiking til søluna av bundnum lutum, drekkamunni og pannukøkum í kjallaranum á ólavsøku.